NEMLIA

## TÍÐINDASKRIV

# Talgilding í eldrarøktini – Fresenius University of Applied Sciences í Heidelberg hevur kunnað um verkætlan saman við fyritøkuni Nemlia.

**Heidelberg, 23.02.2022.**
**Í endanum av 2021 byrjaði eitt serligt samstarv millum føroysku fyritøkuna Nemlia og Fresenius University of Applied Sciences í Heidelberg, sum hevur gjørt  tað møguligt at byrja eina verkætlan um talgilding í eldrarøktini. Verkætlanarritgerðin, sum varð løgd fram í februar, gevur eitt áhugavert innlit í røktargeiran, sum í løtuni fer ígjøgnum størri broytingar, enn vit hava  sæð áður.**

Krøvini til starvsfólkini í røktargeiranum gerast alsamt meira umfatandi, samstundis sum starvsfólkatrot og avmarkað tíð gera arbeiðsumstøðurnar truplari. Tøknilig tól, sum lætta um hjá starvsfólkunum, koma tí væl við og hava  størri týdning nú enn nakrantíð áður.
Henda gongdin legði lunnar undir samstarvið millum Fresenius University of Applied Sciences í Heidelberg og Nemlia, sum við sínum tøkniligu loysnum hevur serkunnleika innan heilsumarknaðin. Nemlia kom á týska marknaðin miðskeiðis í 2021 við endamálinum at lætta um arbeiðsbyrðuna hjá røktarstarvsfólkum við sensorbaseraðum appum, soleiðis at tey aftur kunnu brúka sína tíð og orku upp á veruliga røkt. Tvørfakliga verkætlanarsamstarvið millum Nemlia og Fresenius University of Applied Sciences í Heidelberg byrjaði samstundis sum  Nemlia fekk sínar fyrstu  royndarkundar á týska marknaðinum.

Í hesi verkætlan er dentur lagdur á  talgildingina í eldrarøktini, og tað hevur millum annað verið granskað  í undirtøkuni av talgilding í røktargeiranum, um talgildingin ber til  og í teimum møguleikum, sum talgildar loysnir geva røktargeiranum. Harafturat eru  etisku sjónarmiðini og lógarligu krøvini til verju av privatlívinum eisini væl lýst.

### Talgildu tólini lætta um í røktini

Samstarvið við Fresenius University of Applied Sciences byrjaði síðst í 2021 við kjaki og drúgvum samskifti. Nemlia bjóðaði teimum lesandi á gátt hjá Peer Benzten, stjóra, har Lone Aggersbjerg úr týska høvuðssætinum hjá Nemlia í Heidelberg eisini var til staðar. Í februar varð úrslitið av hesum kanningararbeiði  lagt fram í einari hugtakandi framløgu. Úrslitið av kvalitativu kanningarsamrøðunum við útvaldar luttakarar úr Heidelberg- og Mannheim økinum vísir á møguleikarnar við talgildingini í røktini úr   sjónarhornum: hjá ávikavist røktarstarvsfólkum, leiðsluni og avvarðandi. Samanumtikið kann staðfestast, at  talgildingin kann  optimera og stuðla røktarveitingum. Bæði í heimarøktini og á bústovnum. Talgild tól kunnu sambært hesi kanning gera  gera tilgongdirnar í røktini greiðari og fer tað at  lætta um arbeiðsbyrðuna.

**Nemlia Sp/f**
J.H. Schrøtersgøta 7
100 Tórshavn

**nemlia.com**

NEMLIA

**Væleydnað samstarv, sum boðar frá góðum**

Tað eru ikki bert tey í Nemlia, ið eru væl nøgd við hetta samstarvið. Eisini Fresenius University of Applied Sciences í Heidelberg letur væl at samstarvinum partanna millum. Í einari samrøðu greiddi bólkaleiðarin, professarin Dr. Will Ritzau, Digital Business Management & Sustainability, soleiðis frá:

„Samstørv hjá okkara universiteti við dynamiskar og viðkomandi fyritøkur sum Nemlia geva ikki bara okkara gransking viðkomandi praktiskar royndir. Okkara lesandi fáa eisini innlit í øki, har tey kunnu nýta sína ástøðiligu vitan til at kanna týðandi lið í víðarimenningini av loysnum og nýtslustøðum."

Stjórin í Nemlia, Peer Bentzen, hevði eisini eina jaliga viðmerking um úrslitið av samstarvinum:

"Eg fegnist um munadygga  og nærlagda arbeiðið, sum vit hava sæð frá Fresenius University of Applied Sciences. Kanningin og úrslitini vátta hundrað prosent, at vit eru á røttu leið við okkara loysnum, og at Nemlia kemur við einum einastandandi tilboði til týska marknaðin. Vit eru takksom fyri samstarvið og gleða okkum til enn fleiri verkætlanir av hesum slagi í framtíðini".

## Vilt tú vita meira um hetta evnið,<br>ert tú vælkomin at seta teg í samband við:

**Eyðbjørg Leo, Produktleiðari**
**eydbjorg@nemlia.com**
**Nemlia Sp/f**
**J.H. Schrøtersgøta 7**
**100 Tórshavn**

**Um Nemlia**

Nemlia er stovnað í Føroyum, og hevur síðani 2021 verið virkið á týska marknaðinum, umframt í Danmark og Englandi. Innan heilsugeiran hevur Nemlia servitan í tøkniligum loysnum til starvsfólk í røktargeiranum og heimarøkt. Málið hjá Nemlia er at lætta so nógv um hjá starvsfólkunum sum gjørligt  við at nýta so lítið av tøkni sum til ber. Hetta fyri at tey skulu fáa betri tíð til  veruliga røkt. Hjá Nemlia er menniskja altíð í miðdeplinum, tá ið tænastur verða mentar. Snildar loysnir mentar av røktarstarvsfólki til røktarstarvsfólk.

**Um Fresenius University of Applied Sciences í Heidelberg**

Fresenius University of Applied Sciences í Heidelberg er eitt alment viðurkent universitet í landspartinum Badem-Wüttemberg. Universitetið bjóðar fulltíðarútbugvingar innan fleiri fak, heilt frá Business & Managment til sálarfrøði og sosialt arbeiði. Universitetið er partur av Fresenius University-netverkinum við 18.000 lesandi í Berlin, Düsseldorf, Frankfurt am Main, Hamborg, Idstein, Køln, München og Wiesbaden umframt eina lestrarskrivstovu í New York.





